# Ung fáa banka uttan avgreiðslur

**– Tey ungu krevja meira í dag. Tey ynskja okkurt nýtt alla tíðina, og gjørdu vit av at savna tíggju ymisk ung úr øllum landinum, at koma við hugskotum og hetta er eitt teirra, sigur Hilmar Sam Jacobsen, leiðari í nýggja ungdómsbankanum hjá Eik, Ung í Eik**



*Ung í Eik heldur til í deildini hjá Eik Banka á Tinghúsvegnum, beint yvir av SMS*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í farnu viku læt Føroya Banki upp bústaðarmeklarafelagi Skyn. Hetta fyri at kunna veita kundunum eina betri heildarveiting, varð millum annað sagt.

Eik Banki hevur frammanundan eina ognarmeklarafyritøku í Inni, men ynskja eisini at kunna bjóða kundum sínum so góða tænastu sum gjørligt. Tí hava tey nú latið upp ein ungdómsbanka fyri ung millum 18 og 25 ár.

– Tey ungu krevja meira í dag. Tey ynskja okkurt nýtt alla tíðina, og gjørdu vit av at savna tíggju ymisk ung úr øllum landinum, at koma við hugskotum og hetta er eitt teirra, sigur Hilmar Sam Jacobsen, leiðari í Ung í Eik.

Hann greiðir frá, at ungdómsbankin er ein ásannan av, at ung hava ein øðrvísi tørv enn restin av kundaskara teirra.

**Ung til tey ungu**

– Ráðgevararnir á ungdómsdeildini eru ungir og duga væl at seta seg inn í støðuna hjá teimum ungu, sigur Hilmar Sam Jacobsen. Hann greiðir frá, at bankin fyrst og fremst fer at leggja seg eftir, at veita teimum ungu ráðgeving, heldur enn at tveita stór lán í høvdið á teimum.

Hann nevnir síðani møguleikarnar, sum bankin hevur at bjóða við eitt nú ráðgeving, uppsparing, ungdómslánum, lestrarkreditt, húslánum og billánum.

**Eingin avgreiðsla**

Tað sum annars kemur at merkja ungdómsbankan er, at hann verður munandi meiri litríkur enn bankar flest. Tónleikur, teldur, stórskíggjar og ongar avgreiðslur av nøkrum slag eru eyðkennini í nýggju deildini.

– Vit hava eitt pengaleyst samfelag, har øll ung hava eitt gjaldskort, og tí slepst eisini undan vanligu avgreiðslunum, segði Hilmar Sam Lamhauge, tá Ung í Eik læt upp fríggjadagin.

## VEÐRIÐ


Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, seinnapartin nakað minni vindur. Regn ella vátakavi av og á og hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av eystri, um kvøldið minni vindur. Regn av og á og hitin millum 5 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av eystri ella av ymsum ættum og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og eystri og ælingur, men eisini sólgottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -11 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | -1 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 8 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | -9 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | 1 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 9 |
| Athen | 14 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 5 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | -5 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 15 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 973 hPa. vestan fyri Hebridurnar fer spakuliga í útnyrðing og brúgvalagið sunnan fyri Føroyar verður yvir Føroyum komandi samdøgur.




**Í dag:**
Lágtrýstið skamt eystan fyri Føroyar fer spakuliga norðureftir. Lágtrýstið sunnan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað og brúgvalagið til Írlands fer spakuliga norðureftir

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/2 kl. 06⁰⁰– 14/2. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,9°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í januar: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 11/2 kl. 06⁰⁰– 12/2 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 25,0 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com






- altíð eitt tiltak miðlahúsinum
Tiltøk í februar
24. februar
*Aglow*

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 17. februar | Tendring |
| 19. februar | Mánin næstur jørðini |
| 24. februar | Fyrra kvarter |

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. Febr. | 08.33 | 20.57 | 07.33 | 19.57 | 07.48 | 20.12 | 10.33 | 22.57 | 11.33 | 23.57 | 06.48 | 19.12 | 05.48 | 18.12 | 08.48 | 21.12 | 09.48 | 22.12 | 08.18 | 20.42 | 09.33 | 21.57 |
| 21. Febr. | 09.21 | 21.45 | 08.21 | 20.45 | 08.36 | 21.00 | 11.21 | 23.45 | - | 12.21 | 07.36 | 20.00 | 06.36 | 19.00 | 09.36 | 22.00 | 10.36 | 23.00 | 09.06 | 21.30 | 10.21 | 22.45 |
| 22. Febr. | 10.10 | 22.36 | 09.10 | 21.36 | 09.25 | 21.51 | - | 12.10 | 00.45 | 13.10 | 08.25 | 20.51 | 07.25 | 19.51 | 10.25 | 22.51 | 11.25 | 23.51 | 09.55 | 22.21 | 11.10 | 23.36 |
| 23. Febr. | 11.02 | 23.29 | 10.02 | 22.29 | 10.17 | 22.44 | 00.36 | 13.02 | 01.36 | 14.02 | 09.17 | 21.44 | 08.17 | 20.44 | 11.17 | 23.44 | - | 12.17 | 10.47 | 23.14 | - | 12.02 |
| 24. Febr. | - | 12.11 | 11.11 | 23.52 | 11.26 | - | 01.29 | 14.11 | 02.29 | 15.11 | 10.26 | 23.07 | 09.26 | 22.07 | - | 12.26 | 00.44 | 13.26 | 11.56 | - | 00.29 | 13.11 |